Blástempla títt CV



# Ver við til at styrkja mentan og samfelag okkara

## – løgfrøðingur/fulltrúi til Mentamálaráðið

Hevur tú hug at royna spennandi avbjóðingina at arbeiða saman við landsins fremstu politisku og fyrisitingarligu myndugleikum innan undirvísing, gransking og mentan, so bjóða vit tær eitt spennandi fulltrúastarv á aðalskrivstovuni í Mentamálaráðnum.

**Starvsøkið**
Høvuðsuppgávurnar hjá tær verða m.a.:

- Lógarfyrireiking, kunngerðir og reglugerðir
- Ráðgeving og vegleiðing til landsstýriskvinnu, starvsfólk, stovnar og borgarar
- Vegleiðing og kunning um nýggjar lógir o.a.
- Umsiting av málsøkjum, sum verða løgd til tín
- Málsviðgerð
- Kæruviðgerð
- Aðrar uppgávur

**Førleikakrøv**
Ynskiligt er, at tú hevur løgfrøðiligt embætisprógv (cand. jur.), MA ella BA í løgfrøði. Fært tú prógv sum BA, MA ella kandidatur í summar, ert tú eisini sera vælkomin at søkja.

Tú hevur annars eitt sjálvstøðugt arbeiðslag, ert fyrikomandi og dugir væl at samstarva og samskifta við arbeiðsfelagar og viðskiftafólk. Fyrimunur er at hava viðkomandi royndir, tó at hetta ikki er krav.

**Vit bjóða**

- Eitt spennandi og sjálvstøðugt starv við fjølbroyttum uppgávum og nógvum samskifti úteftir
- Samstarv við royndar løgfrøðingar
- Luttøku í løgfrøðiligum samstarvsmótum
- Skeið og eftirútbúgving
- Starv í einum toymi við trimum løgfrøðingum

**Setanartreytir**
Starvið verður sett og lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelagið. Setanarøkið fevnir um stjórnarráðini, løgmansskrivstovuna og tilhoyrandi stovnum.

**Umsóknir**
Umsóknir við avritum av prógvum, CV og viðkomandi skjølum kunnu sendast til:

Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn

ella til mmr@mmr.fo.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 25. august 2008 kl. 16.00. Starvið verður at seta frá 1. oktober ella eftir avtalu.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Petur Petersen, aðalstjóra, tel. 555 051.

---

Mentamálaráðið hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.

Á aðalskrivstovuni eru stápsfunktiónir innan m.a. løgfrøði, búskap, HR, kunningartøkni og fyrisiting. Bygnaðurin í Mentamálaráðnum er býttur í tríggjar deildir – fólkaskúladeild, vinnu-/miðnámsskúladeild og mentamáladeild – sum stápsfunktiónirnar veita ráðgeving til, umframt at tær ráðgeva aðalstjóranum og landsstýriskvinnuni.

SENDISTOVAN

**Mentamálaráðið**

# Ferðavinnusamstarv millum Ísland, Grønland og Føroyar

Øllum við áhuga í ferðavinnu- samstarvi landanna millum, stendur í boði at søkja stuðul í sambandi við fígging av verkætlanum, hugskotum, vørumenning, ferðum ella líknandi. Samstarvið skal umfata minst tvey av teimum trimum londunum.

Stuðul verður veittur til verkætlanir innan hesi øki:

**Útbúgving**
uppihald til starvsvenjing, fakligar kanningarferðir, skúlaferðir, ferðavinnuútbúgvingar og tílíkt

**Menning av 'kombinationsturisme'**
cruise, temaferðir, short break og tílíkt

**Millumlanda samstarv**
mentanartiltøk, skúlaferðir og tílíkt

**Marknaðarføring og greining av ferðavinnu**
at skunda undir altjóða marknaðarføringsátøk

Stuðul verður veittur til verkætlanir, ferðing ella virksemi, sum fer fram innan árslok 2008. Umsóknin skal skrivast á umsóknarblað, har møguliga nærri frágreiðing og fíggjarætlan kann leggjast við. Umsóknin skal skrivast á donskum ella enskum og sendast til:

**NATA c/o SamVit**
Bryggjubakki 12
Postsmoga 118
110 Tórshavn

Møguligir spurningar kunnu setast til: Per Hansen á tel. 306904 ella teldupost: per@samvit.fo

**Evstamark fyri at senda inn umsókn er 29. august 2008**

Leiðbeining kann fáast hjá SamVit. Umsóknarblað kann takast niður frá www.samvit.fo

NATA
North Atlantic Tourism Association




# HANDILSLEIÐARI TIL NORRÖNU

Smyril Line bjóðar áhugavert og avbjóðandi starv sum handilsleiðari í einum altjóða umhvørvi har lyklaorðini eru:

- Ábyrgd
- Personlig avbjóðing
- Dygd
- Faklig menning
- Persónlig menning

Tú ynskir at skapa úrslit og hevur góð samstarvsevni. Við tínum royndum innan starvsøki, veist tú hvat krevst, fyri at handilin skal verða í støðugari menning. Vit seta dagliga trivnaðin sera høgt, og vanta vit av tær, at tú dugir at leiða og stuðla tínum samstarvsfelagum. Tú fært ábyrgd av ætlanum og starvsfólkum, og verður ímyndin av einum góðum arbeiðsumhvørvi. Sum handilsleiðari fært tú nógva ábyrgd, men samstundis eisini frælsi at viðgera dagligu avbjóðingarnar.

Førleikakrøv:

- Viðkomandi útbúgving, t.d. økonomi og handil
- Royndir í líknandi starvi (handilsleiðari, handilsleiðarahjálpari)
- Leiðsluroyndir
- Góðan telduførleika (Office-pakkin)
- Dugir at arbeiða strukturerað
- Skandinaviskt og enskt í talu og skrift
- Kunnleiki til OSCAR ella líknandi kassa- og goymsluskipan

Vit vilja heita á bæði kvinnur og menn at søkja starvið.

Ynskir tú at fáa meira at vita, vitja www.smyril-line.com ella ring +298 34 49 00 og spyr eftir Hotel Manager.

Umsóknarfreist: **17. sept. 2008**

Skrivligar umsóknir við CV, skulu sendast til:
crew@smyril-line.fo,
mrk. SHOP SUPERVISOR

Smyril Line varð stovnað í 1982, og er í dag ein altjóða fyritøka við skrivstovum í Føroyum, Íslandi, Noreg, Týsklandi og Danmark. Umframt egnar skrivstovur, hevur felagið eisini samstarvsfelagar í meginpartinum av evropeiska meginlandinum og restini av útheiminum.

SMYRIL LINE · YVIRI VIÐ STROND 1 · POSTBOKS 370 · FO-110 TÓRSHAVN
TLF 34 59 00 · FAX 34 59 50 · OFFICE@SMYRIL-LINE.FO · WWW.SMYRIL-LINE.COM